# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Adventistaskúlin:

## Floksfelagar hittust 25 ár seinni

25 ár eftir at flokksmyndin av 5. og 6. flokki í Adventistaskúlanum í Havn var tikin í 1979, høvdu næmingarnir sett hvør øðrum stevnu á Føroya Sjómansskúla 26. mars 2004.

Onkur var komin úr Danmark, men tríggir av næmingunum kundu ikki møta. Saman við næmingunum var fyrrverandi lærarin á Adventistaskúlanum Effie Campbell. Hon hugleiddi um skúlaárini, og hvussu hon mintist teir einstaku næmingarnar.




*Flokksmynd, 5. og 6. flokkur í 1979. Aftasta rað f.v.: Ingi Jacobsen, Gunnar Isholm Simonsen, Ruth Askham, Johan Petur Johansen, Dag Borðoy, Anna Madsen, og Kennet (danskur læraravikarur). Miðraðið f.v.: Reidi Samuelsen, Hans Jacob á Lava, Eiler Guttesen, Eyðun Joensen, og Óluva Funding Fremst f.v.: Christian Johannesen, Jákup Eli Jacobsen, Eydna Joensen, Hanna á Roykheyggi, Liss Berg, og Kári L. Knudsen*



*Mynd tikin á Føroya Sjómansskúla 26. mars 2004. Aftasta rað f.v.: Ingi Jacobsen, Liss Joan (Berg) Hansen, Johan Petur Johansen, Dag Borðoy, og Anna (Madsen) Gullaksdóttir Miðraðið f.v.: Christian Johannesen, Reidi Samuelsen, Hans Jacob á Lava, Eiler Guttesen, Eyðun Joensen, og Effie Campbell, lærari Fremst f.v.: Jákup Eli Jacobsen, Eydna Joensen, Hanna (á Roykheyggi) Thomsen, og Ruth (Askham) Thomsen. Hesi vanta á myndini: Gunnar Isholm Simonsen, Óluva Funding og Kári L Knudsen*

Hans Juul Hammer og Fríðálvur Bláhamar:

## 25 ára starvsdag hjá Føroya Tele

Fríggjadagin 24. juni bjóðaði Vinnudeildin hjá Føroya Tele til móttøku á matstovuni Neptun í Klingruni í Hoyvík í samband við at tvey av starvsfólkunum, Hans Juul Hammer í Havn og Fríðálvur Bláhamar í Vestmanna, høvdu arbeitt hjá fyritøkuni í 25 ár.

Báðir byrjaðu teir á gomlu telefonstøðini við Tinghúsvegin. Teir vóru settir í starv av Poul Havn, kaðalmeistara. Arbeiðsformenn vóru Hanni Jacobsen og Ejler Eysturtún.

Hans Juul hevur arbeitt sum montørur í Havnini øll árini, bæði hjá privatum og vinnukundum. Fríðálvur arbeiddi í Havn tey fyrstu seks árini. Hann byrjaði sum mortørur, síðan arbeiddi hann á kaðaldeildini og seinni sum feilrættari og á vekslaradeildini.

Í 1986 varð Fríðálvur fluttur til øki 2, ið umfatar bygdirnar í Norðurstreymoy og Norðureysturoy - heilt frá Vestmanna til Gjáar. Har arbeiðir hann sum teknikari og montørur og hevur kundarøkt og servisering av øllum tólum frá Føroya Tele í økinum.

Fríðálvur hevur stóran áhuga fyri bilum og motorsúkklum. Hann var í nøkur ár í Vestmanna Sløkkiliði sum varasløkkiliðsleiðari. Hann er giftur Jónleyg, f. Miðberg, úr Vestmanna, og tey eiga dóttrina, Unn.

Teknisku framstigini hava verið ómetaliga stór hesi 25 árini Hans Juul og Fríðálvur hava arbeitt á stovninum. Teir fingu um endan á gamla telefonsentarlinum, tá Telefonverkið átti øll telefontólini og innstallatiónirnar. Alt telefonkervi var tá automatiserað, og digitaliseringin byrjaði. Telexini vóru utskift við telefax o.s.v.

Bæði Hans Juul og Fríðálvur hava trivist sera væl í síðan arbeiði. Teir vera av kundum og starvsfeløgunum mettir sum dugnaligir, álítandi og arbeiðssamir menn og hava eina holla vitan um alt innan síni virkisøki.



*Hans Juul Hammer (v.m.) og Fríðálvur Bláhamar høvdu 25 ára starvsdag hjá Føroya Tele fríggjadagin*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*